Útsølan í Línbúðini
byrjar 21. januar kl. 9.00

BH frá kr. 98,- o.a.

Ikki útsøluvøra
-10%

Línbúðin
Tróndagøta 32 • 100 Tórshavn • Tel. 31 23 85



D. B. Bilar
Sera góðir nýggjari brúktir bilar til sølu

**Toyota Corolla 1,6 Hatchback**
hvítur, árg. maj 99, km. 24.000
**Kr. 115.000**

**KIA Sephia 1,5 Sedan GTX**
reyður, árg. august 99, km. 26.700
**Kr. 108.000**

**Kia Clarus 1,8 SLX**
blátt met., árg. oktober 97, km. 38.000
**Kr. 108.000**

**KIA Sephia II 1,5 Hatchback**
grønur met., árg. juli 2000, km. 17.500
**Kr. 120.000**

**Daihatsu Coure 1,0 Lux. model**
silvur met., árg. september 2000, km. 7.600
**Kr. 98.000**

**Daihatsu Siron 1,0**
koksgrátt met., árg. nov. 98, km. 45.000
**Kr. 78.000**

**Daewoo Nubira 1,6**
silvur met., árg. desember 98, km. 22.000
**Kr. 108.000**

**Hyundai Accent 1,6 SL**
ljóst grønt met., árg. des. 99, km. 51.000
**Kr. 85.000**

D. B. Bilar J. Broncksgøta 15 · Tel. 31 06 00



GÓÐUR DØGVERÐI



Í januar & februar
Mikudag - hósdag frá kl. 12.00 - 14.00
og 17.00 - 19.00 fæst ræstur fiskur
v/ garnatálg - spiki. Kaffi & kleynur.
Prísur 55,00 kr. pr. persón.
Sigi frá dagin fyri á tlf. 221379 ella 317024
Stongt fyri óteknað
Vælkomin inn á gólvið
Café Karlsborg
v/Olevina Joensen
Á bryggjubakka • Tel. 317464 • Fax 317024


Sosialurin - 311820


**Til sølu**

3 1/2 ára gamal myrkabláur Renault Megané Classic 1.6, í sera góðum standi, til sølu fyri sámuligan prís.

**Tlf. 217406 – 3210767**


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2832, Sp/f Tera, 600 Saltangará.

Viðtøkur broyttar:
03.09.2001.
Kapitalur:
Hækking við kr. 40.000,00 til kr. 120.000,00
Inngjaldingarháttur:
Kontant kr. 40.000,00 til kurs 100.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Kaj Johannesen, 645 Æðuvík.
Innkomin sum stjóri: Arni Holm Carlsen, 650 Toftir.
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil, teldutænastur, ídnað og søluvirksemi og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 17. januar 2002

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2326, P/F Atlantic Plast, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar:
20.12.2001.
Strikan av hjánavni: P/F Atlantic Bygging (P/F Atlantic Plast)
Endamál: Endamál felagsins er at reka handilsvirksemi, íløguvirksemi, harundir at gera íløgur í fastogn, feløg, virðisbrøv, valuta v.m., byggivirksemi og ídnaðarvirki, harundir at reka betongblandistøð og gera framleiðslu úr plast og selja framleiðsluna.

Skráseting Føroya tann 11. januar 2002

Kristin Balle


Hafnia Lounge
· Stórt úrval av kaffi
· Dagsins køka
· Sandwich
· Flógv terta við salati
· Ymisk "snacks"
· Smyrjibreyð frá kl. 14-17
(aftaná kl. 17 eftir áheitan)

**Upplatingartíðir**

***Sunnudag - hósdag***
Opið kl. 14.00-24.00

***Fríggjadag & leygardag***
Opið kl. 14.00-01.00

Tlf. 31 32 33 · Fax 31 52 50


Lesið Sosialin



# Andalig miðstøð í Skálafirði

**Samkoman Keldan í Skálafirði er farin undir stóra útbygging. Eina andaliga miðstøð nevnir samkomuleiðarin bygningina**

TRÚARLÍV
*Edvard Joensen*

**Skálafirði:** Fyrsta byggistig av trimum hjá Kelduni í Skálafirði er komið so mikið væl áleiðis, at innilokað verður helst í næsta mánaða. Væntandi verður flutt inn í hendan bygningin tíðliga í heyst.

Samkoman Keldan í Skálafirði er farin undir eina størri verkætlan, sum fevnir um tveir bygningar við millumbygningi.

Pauli Høj, samkomuleiðari, nevnir byggingina eina andaliga miðstøð, sum skal vera miðdepil fyri andaligum arbeiði av ymsum slagi. So sum barna- og ungdómsarbeiði, konsertum, skeiðum og ráðstevnum eins og vanligum andaligum møtum. Sjálvur møtisalurin, sum eisini verður gjørdur til konserthøli, fer at rúma umleið 1.000 fólkum, sigur hann.

Fyrri bygningurin er komin upp at standa og verður væntandi innilokaður seinast í februar. Hann fer at hýsa stóra salinum og verður væntandi klárur at taka í brúk einaferð tíðliga í heyst, sigur Pauli Høj. Hann er í einari hædd við balkong.

Annað byggistig verður ein eitt sindur minni bygningur, tó í trimum hæddum. Har verður í fyrsta umfari gjørt klárt til barna- og ungdómsarbeiði í niðastu hædd. Seinni verður miðhæddin innrættað til kømur, sum kunnu brúkast, tá eitt nú ráðstevnur ella tílíkt eru í húsinum. Hvat ovasta hæddin fer at verða brúkt til, er ikki rættiliga avgjørt enn, sigur Pauli Høj.

Millum báðar bygningarnar verður kafeteria, sum skal virka sum eitt slag av torgi ella samlingsstaði fyri øll, sum eru í húsunum báðum, greiðir leiðarin frá.

Talan verður ikki um nakað leguhús í sama mun, sum vit kenna eitt nú í Nesvík ella í Vatnsoyrum, sigur Pauli Høj. Men kortini verður gjørt so, at til ber at gista, um tørvur er á tí.

Tað er út í móti einum ári síðan, at farið varð undir verkætlanina. Byggiloyvið varð fingið til vega í mars mánaða í fjør, sigur Pauli Høj, og síðan varð farið undir útgrevsturin.

Hendan byggingin er kostnaðarmikil, sum vera man. Fyrsta byggistig fer helst at kosta einar fýra-fimm milíónir, og tá alt er liðugt, fer samlaði kostnaðurin helst at liggja einastaðni millum 15 og 20 milliónir, væntar Pauli Høj.

Men bygningarnir fara ikki at standa samkomuni sum so í nøkrum pengum kortini, greiðir hann frá, tí alt verður fíggjað við sjálvbodnari arbeiðsmegi og gávum frá Guði og góðum fólki.

– Fólk geva gleðiliga til hetta góða tiltak, og einki er álagt nøkrum sum helst at lata nakað ávíst, sigur Pauli Høj.

Hann leggur dent á, at eingin skal kenna seg noyddan at lata nakað, hóast tey koma meira ella minni regluliga í samkomuna. Tann, sum einki letur, er minst líka vælkomin sum tann, sum letur gávur til tiltakið.

Miðað verður í móti at hava alla byggingina lidna í komandi ári, sigur Pauli Høj, samkomuleiðari í Kelduni í Skálafirði.



*Nýggi bygningurin hjá Kelduni er innan fyri verandi samkomuhúsið, sum er vorðið ov lítið til virksemið hjá samkomuni*
*Mynd: Edvard Joensen*

# Gera veg á Skála



*Byggifelagið Højgaard & Schultz er farið undir vegagerðina av Skála út á Strendur*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Vegagerðin millum Skála og strender er byrjað, og fyrsta stig verður væntandi liðugt í august. Nær restin verður liðug, velst um játtanina, sigur landsverkfrøðingurin**

VEGAGERÐ
*Edvard Joensen*

**Skála:** Byrjað er upp á endaligu vegagerðina millum Skála og Strendur. Byrjað er innanvert ítróttarhøllina á Skála, og ætlanin er at binda í nýggja vegendan Innan Glyvur.

Vegføringin verður løgd úr svinginum innanvert ítróttarhøllina á Skála og fer at liggja oman fyri bygdirnar á Skála og Innan Glyvur, sigur Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur. Í fyrsta umfarinum, sum nú verður gjørt, er ætlanin at taka ein góðan kilometur. Arbeiðið, sum gjørt verður í ár, fer væntandi at kosta einar níggju-tíggju milliónir. Tá eru ymiskar útreiðslur sum projektering o.a. uppií, sigur hann.

Vegastrekkið, sum nú verður gjørt, er boðið út, og er tað byggifelagið Højgaard & Schultz, sum ger arbeiðið. Tilboðið frá Højgaard & Schultz upp á sjálvt arbeiðið var upp á knappar fimm milliónir,

sigur landsverkfrøðingurin.

Samlaða vegalongdin, sum gerast skal, verður 4.350 metrar, sigur hann.

Annað stig i vegagerðini verður boðið út at gera í komandi fíggjarári. Landsverkfrøðinguirn væntar, at tað fer at verða umleið tað dupulta av tí, gjørt verður í ár. So tá triðja árið er farið, vónar hann, at vegurin út eftir vestara armi er liðugur, sigur Oyvindur Brimnes.

Tað, sum gjørt verður nú, er bara sjálvt undirlagið. Einki verður asfalterað, fyrr enn alt strekkið er liðugt, sigur Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur.